

Keipumynd av koppseting fyrst í 19. øld. Hvat roynir teknarin Gillray at vísa okkum?

## Heilsuviðurskiftini og fólkatalið í Evropa

Í 18. øld gingu fólk ikki í undirklæðum. Tey svóvu í hoyggi og hálmi, sum uddi í loppum og øðrum smákyktum. Tað var ikki óvanligt, at bæði mannfólk og konufólk snúsaðu, og tey spýttu allastaðni. Vanliga ótu øll úr sama trogi, og maturin var rættiliga eintáttaður. Greytur, breyð og epli. Hesin kosturin gjørdi, at tey fingu vitamintrot og ringar sjúkur. Fá dugdu at skilja, at livihátturin og vánaligu heilsuviðurskiftini vóru atvoldin til sjúku og armóð. Hildið varð, at tað var ein gudsdómur.

Í 17. og 18. øld vórðu mong vísindalig framstig gjørd. Men enn var pátrúgvin so stór, at mangastaðni varð hildið hánt um vísindaligu kanningarnar. Nógv høvdu eingilska sjúku, og fólk hildu, at sjúklingurin gjørdist frískur, varð hann trýstur ímillum tvær greinar.

Seinast í 16. øld vórðu hitamátarin og sjóneykan uppfunnin. Hesi tól vórðu góð í læknavísindum.

Í 18. øld doyði triðihvør, sum fekk pokur. Henda sjúkan smittaði illa, og fólk løgdust í hópatali.

Miðskeiðis í 17. øld hvarv svartideyði úr Evropa. Møguliga, tí at svarta rottan, sum hevði tað smittandi loppuna, hvarv. Landfarsótt, kolera, blóðsótt og skarlaksfepur herjaðu eisini í Evropa, men sum frá leið, vórðu færri fólk smittað. Ansað varð eisini betur eftir, at drekkingarvatnið ikki var dálkað.

Í 18. øld vaks fólkatalið, og fleiri pinkubørn hóraðu undan. Tað var vanligt, at konan átti 8-12 børn, men yvirhøvur doyði fjórða hvørt barn, áðrenn tað var ársgamalt. Helmingurin rakk ikki 20 ára aldur.

Aldursmunurin á systkjum var ofta



Copyrighted material

stórur. Gentur og dreingir fluttu heimanífrá, tá ið tey vóru 12-14 ár, og tí vóru ikki so mong í hvørjum húsi. Av tí at so nógv børn doyðu, var miðalaldurin bara 35-40 ár. Men tey, sum livdu til 20 ára aldur, høvdu møguleika at gerast eini 55-60 ár.

Eftir 1750 vaks fólkatalið støðugt. Lívskorini og heilsuviðurskiftini batnaðu, og færri smábørn doyðu.

Her er søgan um læknan, sum fann uppá at koppseta fyri pokur.

Í einari bygd i Onglandi hevði læknin Edward Jenner frætt, at fólk, sum høvdu havt neytapokur, ongantíð fingu vanligar pokur. Ein dagin frætti hann, at ein arbeiðsgenta á einum garði hevði fingið neytapokur. Hann helt avstað, hitti gentuna, og tað eydnaðist honum at kroysta vág úr sári, sum hon hevði á kroppinum. Jenner var vísur í, at vágur við neytapokum í kundi nýtast til koppseting.

Jenner fekk fatur í einum húskalli, sum hvørki hevði neytapokur ella vanligar pokur, og læt vágin úr gentuni í eitt prus, sum húskallurin hevði á hondini. Hann fekk neytapokur, men gjørdist ikki sjúkur. Seinni sprændi Jenner húskallin við vanligari pokusmittu, men hann gjørdist ikki sjúkur. Fleiri royndir vórðu seinni gjørdar við nógvum fólki.




Strikumynd, sum vísir broytingina í fólkatalinum seinastu 800 árini. Í Føroyum hava vit onga neyva vitan um fólkatalið longur enn aftur í 18. øld. Hinvegin er nógv sum bendir á, at flestu bygdirnar eru grundaðar longu í víkingatíð og at ein ávísur fólkavøkstur hevur hildið á inn í miðøld. Í gamla føroyska landbúnaðarsamfelagnum hevur framleiðslan verið knýtt at jørðini; jarðartrot hevur tí longu í miðøld sett mark fyri fólkatalinum, sum í nógv hundrað ár hevur ligið um 3-4000. Tá fiskivinnan í Føroyum tók seg upp í 19. øld broyttist samfelagið heilt, og hetta sást eisini aftur í fólkavøkstrinum.



Copyrighted material

# Fólkavøkstur og heilsa í Føroyum

Um 1750 fór fólkatalið at vaksa allastaðni í Evropa. Nógvar orsakir vóru til henda fólkavøkstur, so sum greitt er frá.

Illa ber til at gera eina meting um fólkatalið í Føroyum í eldri tíð. Eingin ivi er um, at Svartideyði gekk í Føroyum í 1349, soleiðis sum sagt er frá í íslendskum keldum. Í Evropa yvirhøvur verður hildið, at fólkatalið minkaði niður í eina helvt. Hvussu nógv fólkatalið minkaði í Føroyum, ber ikki til at siga. Tó sigur tað nakað, at um ár 1600 var fólkatalið um leið 3.500. Tá ið fólkateljing var í 1801 vóru um 5.200 fólk í Føroyum, t.e. at fólkatalið í um leið 200 ár bara vaks við um leið 1.500 fólkum.



Gomul amboð til lekidóm.
Ovast grøðisteinur, sum er eitt bleytt steinslag, ið kallast fitisteinur. Menn plagdu at hava grøðistein við sær, t.d. tá farið varð til útróðrar. Fekk ein av bátsmonnunum eitt prus, varð beinan vegin skavað niður í sárið.
Niðast úlvasaksur. Í gomlum døgum mettu fólk úlvin sum eitt týdningarmikið yrkisgagn, ið varð hildið at hótta lív og heilsu. T.d. trúðu tey, at ov stórur úlvur kundi elva til ringt svøvnlag, ella at tú gjørdist linur í knøunum.
Ráðini móti hesum var at klippa ella skera av úlvinum, og til hetta varð úlvasaksurin nýttur. Teir tveir stuttu armarnir vóru til at halda úlvinum, meðan hin triði var til at klippa við. Læknar skóru úlvin, men tað varð eisini gjørt heima.
Mynd: Føroya Fornminnissavn.

Ikki er lætt at finna upplýsingar um heilsuviðurskifti í Føroyum í eldri tíð. Vit vita tó, at í 1584 var settur ein *bartskeri*. Soleiðis vórðu hesir „landslæknar“ nevndir fram til 1743. Frá 1745 til 1806 nevndust teir *kirurgar* og frá 1809 til 1883 *landkirurgar*. Tá vistu menn meira um læknafrøði enn fyrr. Í søguligum keldum frá 1600- og 1700-árunum verður við hvørt nomið við heilsuviðurskifti í Føroyum. Tá eru tað serliga útlendingar og so Svabo, sum siga frá.

Eitt samfelag sum tað føroyska var væl vart móti sjúkum, tí sambandið við umheimin var ikki altíð so nógv. Men tá ið umfarssóttirnar komu, kundu tær vera herviligar og krevja nógv mannalív. Tá ið „barnapokurnar“ gingu í 1651, lógu næstan øll sjúk í Havn, og nógv doyðu. Tá ið „pokurnar“ gingu í Havn í 1709, doyðu um 300 fólk, og bara um 80 livdu eftir. Á Skansanum doyðu 22 av 30 soldátum, og eisini aðrastaði í Føroyum doyðu nógv fólk. Í 1781 gingu meslingarnir ringir, og nógv doyðu. Ein onnur sjúka var „landfarsótt“, sum smittaði illa, tá ið hon gekk. Heimildir nevna ringar og vanligar sjúkur sum gulsótt, rósin og lungnabruna, ymsar steinasjúkur, gikt, krím og gø, krabbamein í vørrini orsakað av tubbaki, sár av ymsum slag og skrubb.

Landsins lækni hevði eina medisinkistu, men hann fekk ikki gjørt nógv við heiliráðssjúkur. Hann dugdi tó at seta eitt nú brotnar leggir saman. Føroyingar sjálvir høvdu ávís „heimaráð“ at taka til. Úti á bygdunum var altíð onkur maður ella kona, sum hevði serligt hegni at hjálpa sjúkum.



Copyrighted material